# Posta Stamps

Føroyar Nr. **53**

Oktober 2022



Posta
FAROE ISLANDS

**Føroyar undir kalda krígnum**

**Skálhøvdi**

**List eftir Arnold Vegghamar**

Postgjaldsmerki 2023

# Bygdarløg í Suðuroy




Longsti fjørður í Suðuroy er Trongisvágur, uml. 7 kilometrar frá munna í botn. Við fjørðin liggja bygdirnar og bygdarløgini, Froðba, Tvøroyri, Trongisvágur, Øravíkslíð og Øravík, sum í dag eru meira ella minni samanvaksin til størsta býin í oynni, Tvøroyrar kommunu.

## Froðba

Uttast á fjarðararminum fyri norðan liggur gamla landnámsbygdin Froðba. Sambært søgnini, skal Froðba vera elsta bygd í landinum – navnið sigst sipa til danska sagnarkongin Fróða, sum skal hava tikið land har. Men tann søgan skal helst ikki takast fyri fult. Navnið sipar helst til ein av fyrstu niðursetumonnunum á staðnum – og merkir bøur/garður Fróða. Froðba liggur á náttúruvakra láglendinum undir Froðbiarnípu. Í homrunum og framvið strondini síggjast aldargamlar skipanir av basaltsúlum, sum bera boð um ógvusligt gosvirksemi fyri uml. 50 milliónum árum síðani, tá Føroyar vórðu til.

Myndevnið á postgjaldsmerkinum er frá býlinginum "uppi á Hamri," har m.a. kendi yrkjarin Poul F. Joensen búði.

## Tvøroyri

Eitt sindur paradoksalt, er Tvøroyri, sum eisini liggur á norðara fjarðararmi millum Froðba og Trongisvág, yngsta búsetingin. Økið var upprunaliga ein partur av Froðbiarhaganum, men tá kongaligi einahandilin í 1836 legði ein úthandil á oyruna, byrjaði bygdin at spretta kring hann – serliga eftir at einahandilin varð avtikin í 1856. Einstaklingar tóku yvir handilsvirksemið, sum við tíðini víðkaðist við reiðaravirksemi og einum vaksandi fiskiídnaði. Við fyrra aldarmót var Tvøroyri

vaksin til eina av størstu bygdunum í landinum við størsta fiskiídnaðinum.

Myndevnið á postgjaldsmerkinum er Kirkjubrekkan, ið leiðir niðan til Tvøroyrar kirkju. Gamla sóknarkirkjan lá upprunaliga í Froðba, men tá nýggja búsetingin á Tvøroyri var farin at vaksa, varð avgjørt at flyta hana hagar í 1856. Frá 1880 til aldarskiftið tvífaldaðist fólkatalið í sóknini – og tí varð avgerð tikin um at byggja nýggja og størri kirkju. Danski arkitekturin Viggo Bertram teknaði kirkjuna – og legði dent á, at hon skuldi standa ímóti ógvusliga føroyska veðurlagnum við íðuligum ódnarstormum og regni. Hetta setti dám á arkitekturin í kirkjuni - stórviðurin varð boltaður fastur í grundina av basaltgróti, sum í sínum lag var boltað føst í helluna. Man kan siga, at kirkjan á Tvøroyri er bygd eftir kendu orðunum í Matteus 7,24, um at byggja hús sítt






**Froðba**
Mynd: alamy.com

á hellubotn. Kirkjan varð forvirkað í Noregi – og í 1905 byrjaði arbeiðið at reisa hana. Trý ár seinni, í 1908, stóð vakra nýggja kirkjan liðug.

## Trongisvágur

Inni á fjarðarbotni liggur Trongisvágur, ið júst sum Froðba, er aldargomul bygd, sum nú er vaksin saman við Tvøroyri. Frá gamlari tíð var bygdin skipað við býlingum framvið mataránni Stórá, sum rennur út í fjørðin. Myndevnið á postgjaldsmerkinum avmyndar ein av hesum býlingum,"í Húsgarði."

Seinastu 40 árini eru stórar broytingar farnar fram í Trongisvági. Ítróttarhøll og fótbóltsvøllur eru bygd framvið Stórá – barnagarður, skúli og kampingpláss eru løgd har, umframt útstykking av íbúðarøkjum og tilhoyrandi vegakervi.

Í vakra náttúruumhvørvinum finst millum annað ein gomul viðarlund við gongugøtum. Framvið vesturstrondini finnast stórslignar geologiskar klettaskipanir í elstu vulkansku basaltløgunum, sum bara koma undan í Suðuroy, Mykinesi og parti av Vágum. Í ein útsynning úr bygdini liggur Rangabotnur við sínum kollindum frá ógvusligum gosvirksemi fyri uml. 50 mill. árum síðani. Her brutu teir kol fyri gott 100 árum síðani – og úr Rangabotni út móti Drelnesi síggjast enn leivdirnar av stórviðinum til rennistrongin, sum flutti kolið frá kolanámunum til farmaskipini.

## Hov

Á fjórða og seinasta postgjaldsmerkinum eru vit farin av Trongisvági suður til bygdina Hov, við Hovsfjørð. Hov er eisini aldargomul bygd og verður fleiri ferðir nevnd í Føroyasøgu. Her búði Havgrímur illi, høvdingur fyri syðra part av landinum. "Hov" merkir tempul/blóthús, har fólk í víkingatíðini blótaðu og dyrkaðu norrønu gudarnar. Sagt verður um Havgrím, at hann var "blótmaður mikil," t.v.s. ein maður, ið stóð fyri stórum blótum (ofringum).

Í líðini yvir Hovsbygd framvið gamla landsvegnum til Tvøroyrar, trína aftur stórfingnar basaltsúlur fram frá eldgosum í fyrndini. Vestanfyri bygdina liggur stóri fossurin Foldaráfossur í Hovsá. Í Hovsfirði liggur "Hovshólmur" – og síðan áttatiárini hava hovbingar alt laks í fjørðinum. Niðri við havnarlagið er eitt lítið fornminnissavn, framsýningarhøli og kafé í gomlu handilsbygningunum.

Á postgjaldsmerkinum kann man eisini hóma kirkjutornið í baksýni. Kirkjan stóð upprunaliga í Vági, men varð flutt til Hovs í 1942, eftir at Vágur fekk størri kirkju í 1939.

*Anker Eli Petersen*



**Tvøroyri**
Mynd: Ólavur Frederiksen

# Føroyar undir kalda krígnum

# 60 ár á Sornfelli




Undir seinna heimsbardaga vóru Føroyar sum kunnugt, hersettar av Stórabretlandi. Sum kríggið leið, bygdu bretar ein hernaðarflogvøll í Vágum - umframt fleiri radarstøðir kring oyggjarnar, sum høvdu eyguni við øllum ið gekk fyri seg í føroyskum loftrúmi og á føroysku havleiðunum.




**Sornfelli - FO 993**

Mynd: Jákup Brúsá

## 60 ár síðan radarin á Sornfelli varð tikin í nýtslu

Føroysku radarstøðirnar høvdu ein týðandi leiklut í skipanini av arktisku hernaðarflutningskonvoyunum, sum serliga fluttu amerikanska hernaðarútgerð til sovjetisku havnabýirnar Murmansk og Arkhangelsk.

Afturat radarstøðunum settu bretar eisini eina sonevnda *Loranstøð* (Long Range Navigation) upp í Vági, fyri at fáa neyvari navigatión á sjógvi og í luftini.

Tá kríggið var av, fekk Danmark aftur suverenitetsrættin yvir Føroyum og Grønlandi (Ísland hevði loyst frá Danmark í 1944). USA sýndi áhuga fyri Loran støðini í Føroyum, og bjóðaði sær til at yvirtaka raksturin av henni. Men danir, lærdir av royndunum við óhepnum avtalum viðvíkjandi amerikanskum hernaðarstøðum í Grønlandi, vrakaðu tilboðið og avgjørdu í skundi sjálvir at reka støðina í 1946, hóast teir ikki høvdu skikkað fólk til uppgávuna.

## Fólkaatkvøðan í 1946 – Heimastýrislógin frá 1948

Danmark viðurkendi, at skilnaðurin undir krígnum hevði broytt støðuna millum Danmark og Føroyar. Undir 5 ára longu

bretsku hersetingini, var ynskið um øktan sjálvsavgerðarrætt vaksið í Føroyum – og beint eftir kríggið byrjaðu samráðingar um framtíðarstøðu Føroya í danska ríkinum og politiskan sjálvsavgerðarrætt. Samráðingarnar gjørdust drúgvar, uttan at semja kom í lag landanna millum – og harafturat vóru føroyingar ósamdir sínámillum. Danska stjórnin setti tí eitt uppskot saman um heimastýri, sum varð lagt fyri løgtingið. Men sjálvt tá kundu føroyingar ikki semjast. Avleiðingin var, at løgtingið útskrivaði eina fólkaatkvøðu um, hvørt føroyingar ynsktu víðkað heimastýri ella loysing frá Danmark. Fólkaatkvøðan vísti ein tepran meiriluta fyri loysing millum tey ið atkvøtt høvdu – men varð skjótt ógildað av donsku stjórnini. Í staðin varð heimastýrislógin sett í gildi í 1948 við víðkaðum ræðisrætti til løgting og landsstýri.

## Danmark fer upp í NATO

Tá Danmark í 1949 fór upp í verjusamgonguna NATO, gjørdust Føroyar og Grønland óbiðin partur av felagskapinum. Hetta vakti misnøgd í Føroyum. Føroyski ríkisdagsmaðurin, Poul Niclassen, setti fyrispurning í ríkisdegnum, hvørt danska skyldan, at leggja millumlandaavtalur ið viðvíktu Føroyum fyri løgtingið, var brotin. Men Hans Hedtoft, forsætismálaráðharri, svaraði, at talan var um eina politiska traktat, sum fall uttanfyri skylduna, sum var útgreinað í heimastýrislógini.

Danmark hevði ikki neyðuga hernaðarorku til munadygga verju av norðuratlantisku pørtunum av ríkinum. Verjan av Føroyum og Grønlandi varð tí løgd undir SACLANT, atlantskommandoina hjá NATO í USA – og um kríggj brast á, vóru tað bretskar hereindir ið skuldu taka sær av beinleiðis verjuni av Føroyum.

Fyrst í fimtiárunum vóru røddir frammi um føroyska heimaverju og um danska herskyldu, men hesum vrakaðu føroyingar.

## Færøernes Kommando

Í 1951 stovnaði danska sjóverjan "Marinedistrikt Færøerne," seinni




**Sornfelli - FO 992**
Mynd: Jákup Brúsá

"Færøernes Kommando," at fremja yvirvaldshevd, fiskivinnueftirlit og bjargingaruppgávur í Føroyum. Upprunaliga brúktu danir gomul hernaðarskip og deksbátar til uppgávuna. Men í 1963 fekk danski flotin tey nýggju sjóverjuskipini av "*Hvidbjørnen*" klassanum, sum vóru bygd til norðuratlantisku havøkini og útgjørd við Alouette-tyrlum. Samstundis varð nýggj marinustøð bygd uppi við Hoyvíkstjørn í Havn og tikin í nýtslu í 1965.

Áhugin fyri Føroyum var fyrstu árini avmarkaður í NATO høpi. Stríðsflogfør hjá hernaðarsamgonguni kundu brúka flogvøllin í Vágum at neyðlenda á – og Skálafjørðurin varð avmerktur sum akkerspláss hjá NATO-skipum og kavbátum, um kríggj skuldi brostið á.

## Loran C og Polaris rakettirnar

Men sum fimtiárini liðu og tøknin mentist í kalda krígnum, broyttist strategiska og taktiska støða Føroya. Hetta orsakað av støðuni mitt í Norðuratlantshavi millum høvuðsleikarnar báðar, USA og Sovjetsamveldið. Valdstríðið millum stórveldini fór fram á nógvum ymsum økjum – á landi, sjógvi og í luftini. Økta hernaðarliga ferðslan og virksemið, kravdi samskipan og neyva navigatión – og síðst í fimtiárunum setti US Coast Guard 30 Loran C radiovitar upp ymsastaðni. Ein av hesum var Loran C støðin á Eiði, sum varð tikin í nýtslu í 1960.

Støðin varð sett upp við loyvi frá donsku stjórnini, goldin av US Coast Guard, og rikin av danska vitaverkinum.

Loran C, Eiði, við sínari 190 metrar høgu sendimastur, var ein "master" støð, stuðlað av "træla" støðum kring Norðuratlantshav. Støðin var ein munagóð ábót til navigatión og knattstøðu-fix hjá NATO-flotanum, m.a. fyri flogberar, kavbátar og hernaðarflogfør.

Serliga hevði skipanin týdning fyri fyrsta ættarlið av kavbátabornu Polaris-kjarnorkurakettunum, hvørs avmarkaði skotmáli førdi við sær, at kavbátarnir noyddust at halda til í Norðurhavi, fyri at rakettirnar skuldu raka ætlað mál í Sovjetsamveldinum.

Loran C skipanin misti tó brátt hernaðarliga virðið. Neyvari navigatiónsskipanir - navigatión umvegis fylgisveinar, teirra millum hernaðarliga útgávan av GPS-navigatiónsskipanini, vit kenna í dag, gjørdust alsamt munadyggari og tóku yvir. Harafturat kom so, at nýggj ættarlið av Polaris-rakettunum bóru dupult so langt sum fyrsta ættarlið – og hetta gjørdi at Polaris-kavbátarnir kundu leggja seg longur burtur enn í Norðurhavi.

## Radarstøðin í Sornfelli

Í 1963 kundu føroyingar staðfesta, at Sornfelli hevði fingið tveir løgnar hvítar kuplar á tindin. Eftir trý ára verkarbeiði, stóð radarstøðin í Sornfelli, við almenna heitinum, "NATO Early Warning Station Site 09," endiliga liðug.

Í øðrum kuplinum stóð ein stórur horisontalradari – og í hinum ein líka so stórur vertikalradari. 80 metrar niðri í sjálvum fjallinum var ein bunkari boraður út við lodrættari námsgongd upp til teir báðar radararnar, sum saman veittu radaropratørunum í fjallinum eina trídimensionella mynd av støðuni á norðuratlantisku farleiðunum og loftrúmi.

Longri niðri í líðini, í Mjørkadali, varð ein fyrisitingar- og bústaðarbygningur bygdur, sum stóð liðugur í 1964. Støðin í Mjørkadali kallaðist "Flyvestation Thorshavn" og var knýtt at danska flogvápninum, ið rak radarstøðina



**Radarstøðin á Sornfelli**
Mynd: Jákup Brúsá

í Sornfelli. Tað var ein partur av avtaluni við NATO, at starvsfólk, radaroperatørar, teknikarar og tænastumanning skuldu vera danir, hóast radarstøðin var ein NATO-verkætlan burturav. Av onkrari orsøk helt danska stjórnin, at hetta fór at føra til størri vælvild mótvegis støðini í Føroyum.

## Early Warning – men fyri hvønn?

Í flestu skrivligum keldum um radarstøðina í Sornfelli, framgongur, at hon var ein leinging av amerikansk- kanadisku DEW (Distant Early Warning) linjuni, sum skuldi ávara USA móti kjarnorkuálopi frá sovjetiskum bumbuflogførum. Í einari grein frá 2020, í "*Internasjonal Politik – Skandinavisk tidsskrift for internasjonale studier,*" ger hernaðargreinarin Esben Salling Hansen, frá "Det Danske Forsvarsakademi", tó vart við, at hetta ikki neyðturviliga nýtist at vera so.

Salling vísir á, at í amerikanskum keldum um DEW-linjuna, verður Sornfelli ikki nevnt sum partur av linjuni. Frá 1961 til 65, varð DEW-linjan longd við at fýra krígsskip og fýra hernaðarflogfør við serligari radarútgerð, áhaldandi vóru til staðar í GIUK-linjuni, sum gongur frá Grønlandi um Ísland til Skotlands. Men Sornfelli var, sum sagt, ikki partur av hesari leinging.

Salling vísir víðari á, at sambært NATO-keldum, varð radarstøðin sett upp sum ein partur av "Air Defence Ground Environment" (NADGE), ein linja av loftøkiseftirlitsradarum og kontrolstøðum, sum vórðu lagdar framvið ytstu NATO-mørkunum móti Sovjetsamveldinum - frá Noregi til Turkalands. Endamálið var at ávara um taktisk álop á NATO-hereindir og landaøki í Evropa. Í hesari víðkaðu ávaringarketuni hjá NATO, var Sornfelli ein tann fyrsta støðin, ið skuldi byggjast.

Samstundis varð ábyrgdin fyri føroyska loftøkið í NATO-høpi flutt til NATO-ovastan í Evropa (SACEUR), meðan ovastin fyri Atlantshavið, (SACLANT) í USA, helt fram við hernaðarligu ábyrgdini fyri føroyska sjóøkið.

Radarstøðin í Sornfelli var sostatt ein partur av sjó- og lufthernaðarligu verjuni av Evropa, sum skuldi stuðla stríðið mótvegis kavbátum – og stríðnum móti sovjetiskum krígsskipum og flogeindum, ið vardu kavbátarnar. Støðin skuldi eisini hava eyguni við lágt gangandi krússara- og sjómálsrakettum, ið hóttu skip og flogfør hjá NATO. Og eftir at radarstøðin í áttatiárunum fekk ein nýggjan trídimensionellan radara og førleika at taka ímóti og senda radarmyndir víðari frá radarflogførunum hjá NATO, var støðin før fyri at staðfesta missilrakettir, ið annars gingu undir radarhædd.

Harvið gjørdist støðin í Sornfelli ein týðandi partur av elektronisku krígsførsluni – og kundi, sum partur av NADGE-ketuni, styðja uppundir høgt prioriterað taktisk hernaðartiltøk, sambært Salling.

## Radarstøðin í Sornfelli stongd

Sum beinleiðis avleiðing av, at kalda kríggið tóktist vera av í nítiárunum, varð radarstøðin í Sornfelli niðurløgd í 2007.

Tað vísir seg tó kortini, at tørvur aftur er á eygunum á Sornfelli. Ætlanin er at seta nýggjan og enn størri radara upp, men tað er ein onnur søga.

*Anker Eli Petersen*

# Welcome to the 2022 SEPAC Promotion

**This year SEPAC (Small European Postal Administration Cooperations) and WOPA+ are teaming up to offer you the chance to get your hands on a selection of fantastic stamps from twelve postal administrations for FREE!**

***To claim your gifts all you have to do is visit the website www.wopa-plus.com/sepac and follow a few simple and easy steps. Once completed, you will be sent a FREE package including stamps from the following countries:***







***Åland***
***Faroe Islands***
***Gibraltar***
***Greenland***
***Guernsey***
***Isle of Man***
***Jersey***
***Liechtenstein***
***Luxembourg***
***Malta***
***Monaco***
***Vatican City***



For further information on the promotion and to claim your gifts, please visit the WOPA+ website

## www.wopa-plus.com/sepac




***Important note: Promotion running for a limited time, claim your gifts today to avoid disappointment!***

***Gifts shown are representative and subject to change depending on availability***





Landslag

# Skálhøvdi




Sunnarlaga á eystursíðuni á Sandoynni, stingur ein hin mest eyðkendi føroyski nakkurin út í hav. Tað er Skálhøvdi, sum stendur millum bygdirnar báðar, Skálavík fyri norðan og Húsavík sunnanfyri.




**Skálhøvdi**




**Útsýni av Skálhøvda**
Myndir: Pól Sundskarð

Staðfrøðiliga er ein høvdi heiti á einum nesi, ið er hægst uttast vid havið. Tíðarinnar tonn, jarðslit og omanlop hava so við tíðini máa eina rundleidda innvík, ein barm, í bergið við steyrrøttum falli - og soleiðis skapt eyðkenda forbergið ið sermerkir Skálhøvda.

Í bókini *Søgur og søgubrot*, sigur Jóannes Dalsgaard, at Skálhøvdi var seinasta stað í Sandoynni, har gamla føroyska seyðaslagið fanst, áðrenn tað var avtikið. Ærnar í Skálhøvda høvdu fyrr í tíðini smá afturbend horn, "sum á gemsu" og tað kom, sambært gamla seyðamanninum Pæturi í Búð, av, at tær bregðaðu aftur í gamla slagið. Jóannes sigur eisini frá, við Waldemar Dalsgaard sum heimildarmanni, at stórfuglur, lomvigi, álka og teisti, fyrr átti í berginum í Torvunøsbarmi og undir Flategg. Men so leyp alt fuglabergið niður á Torvunøsbarm – og hóast fuglurin tey trý fylgjandi árini kom aftur í sjógvin við Skálhøvda, fór hann ikki aftur í bergið.

Skálavík hevði, eftir hvat sigst, upprunaliga sandstrond, júst sum Húsavík sunnanfyri høvdan. Men undir einari herviligari ódn, kanska illkendu kyndilsmessuódnini í 1602, hvarv sandurin og møl kom í staðin, t.v.s. fjøra við malargróti. Onkur vil vera við, at fyribrigdið hevði samband við fyrrnevnda omanlop í høvdanum, men tað er neyvan sannlíkt.

Malargrótið hevur helst verið har alla tíðina, bara grivið undir sandinum. Og tað tekur longur tíð og aðrar umstøður, at tilevna vakra malargrótið í mølini við Skálavík og undir Skálhøvda. Grótið er helst áløga frá ístíðarjøklum, sum annars

sniðskaptu bæði Skálhøvda og dalirnar har Skálavík og Húsavík liggja.

Hóast stórfuglurin hvarv úr berginum í Skálhøvda, kundi skálvíkingar enn veiða lunda sunnanfyri Borðtanga. Hol var komið í tangan, so tá fjøra var, sluppu menn turrskøddir frá fjøruni undir barminum, yvir til sessir sunnanfyri, har teir fleygaðu lundan. Í sjónum beint uttanfyri barmin liggur annars eitt flidnasker, har teir tóku fliður til agn.

Skálhøvdi er eyðkennismerkið hjá Skálavíks bygd. Eitt stórsligið natúr- og jarðfrøðisøki, hvørs stórbæri sæst best av sjónum. Avgjørt vert at vitja, um man er so heppin at vera har um leiðir ein vakran dag.

*Anker Eli Petersen*

*Skálhøvdi er eyðkennismerkið hjá Skálavíks bygd.*
*Mynd: Ólavur Frederiksen*



Litmeistarin

# Arnold Vegghamar







**Skýming, 1993**




**Bygd, 2007**

Fjallið tekur seg upp í forgrundini í myndini. Á fjallasíðuni darra blá, grøn, appilsingul og reyð strok í geislunum frá setandi sólini.

Tað er ein stórfingin náttúruuppliving, ið verður handað okkum við miklari megi og dramatiskum litskrúð í málninginum, *Skýming* frá 1993.

Myndlistamaðurin Arnold Vegghamar er bæði í stíli og myndevni so egin, at áskoðarin sjáldan er í iva um hvør er upphavsmaður til hansara myndir. Vit kenna stílin aftur í hesum litríku myndum, har listamaðurin sameinir tað klassiska føroyska landslagsmyndevnið við sítt heilt egna serliga sjónarmið.

Listamaðurin Arnold Vegghamar er føddur í 1937 á Viðareiði. Hann byrjaði at mála longu í fimtiárunum og tók eitt nú lut á Ólavsøkuframsýningini í 1957. Síðani var hann næmingur á kenda listaskeiðnum, ið vegarar sum Jack Kampmann, Ingálvur av Reyni og Janus Kamban skipaðu fyri á vetri 1958-59. Vegghamar kom í læru sum gullsmiður og starvaðist innan hesa vinnu í nógv ár, samstundis sum hann málaði. Seinastu mongu árini hevur hann málað burturav í arbeiðsrúminum í húsunum í heimbygdini, Viðareiði.

Í 2010 var stór serframsýning í Listasavni Føroya við gomlum og nýggjum verkum hjá Arnold Vegghamar. Her fekk áskoðarin yvirlit yvir stóru menningina í listaliga virkseminum hjá Vegghamar frá veruleikakendum lýsingum av fólkum og náttúru til meira litríkar myndir, ið so líðandi gjørdust alt meira einfaldar og abstraktar, serliga eftir aldarskiftið. Arnold Vegghamar hevur ikki staðið í stað, men hevur síni mongu ár í listini ment seg frá naturalismu til eina uppøsta litríka ekspressionismu og víðari til ein lutfalsliga einfaldan og skreytleysan stíl, har hann endurtulkar siðbundna myndevnið av bygdini við havið, við støði í tí hann sær í sínum umhvørvi í og kring Viðareiði. Hetta

myndevnið hevur hann endurtikið og einfaldað, so at tað er vorðið eyðkent og ikoniskt í málningum, ið prýða mong heim. Sum vit síggja í einum málningi sum *Bygd* frá 2007, er myndevnið naivistiskt lýst uttan hurðar, vindeygu ella aðrar veruleikakendar staklutir. Tey reyðu, gulu, svørtu og hvítu húsini tykjast næstan tilvildarliga sett á myndaflatan eins og legokubbar, ið sveima á eini grønari grund, sum ímyndar gras. Harumframt síggja vit himmal, hav og fjall umframt eina oyggj, sum hómast aftanfyri. Hesir staklutir eru frumevni í amboðskassanum hjá Arnold Vegghamar, sum hann støðugt setir saman av nýggjum, í eini roynd at lýsa okkara umhvørvi og tess tilverutreytir.

Hóast litirnir tykjast lýsandi kátir, kann huglagið í myndunum til tíðir sýnast álvarsligt

*Reyðu, gulu og hvítu húsini tykjast tilvildarliga sett á myndaflatan eins og legokubbar.*

og gátuført – landslagsmyndirnar eru ofta fólkatómar uttan annað lív enn tað, sum náttúran ber í sær. Kortini tykjast bommlittu steinarnir í fjøllum og fjøru spilllivandi, eins ov vóru teir íbygdir. Hetta gevur myndunum hjá Vegghamar eitt serligt samanhangandi brá, sum eisini hómast í teirri bylgjandi havsbrúnni og á fjallatromum í gløðandi landslagsvisiónunum hjá Arnold Vegghamar.

*Kinna Poulsen,*
*Listaummælari og Cand.mag í listasøgu*












| | | | |
|---|---|---|---|
| **Nýggj útgáva:** | **60 ár á Sornfelli** | **Skálhøvdi** | **Arnold Vegghamar** |
| **Útgávudagur:** | 20.02.2023 | 20.02.2023 | 20.02.2023 |
| **Virði:** | 31,00 og 61,00 DKK | 21,00 og 31,00 DKK | 21,00 og 47,00 DKK |
| **Nummar:** | FO 992-993 | FO 994-995 | FO 996-997 |
| **Stødd, frímerki:** | 30 x 40 mm | 30 x 40 mm | 30 x 35 mm |
| **Stødd, smáark:** | 84 x 64 mm | | |
| **Myndir / listafólk:** | Jákup Brúsá | Pól Sundskarð | Arnold Vegghamar |
| **Prentháttur:** | Offset | Offset | Offset |
| **Prentsmiðja:** | Bpost, Belgia | Bpost, Belgia | Cartor Security Printers, Frakland |
| **Postgjaldsbólkur:** | Bræv og brævpakki til útheimin, 0-250 g. | Bræv innanoyggja og til útheimin, 0-100 g. | Bræv og brævpakki innanoyggja, 0-250 g. |
| **Aðrar vørur:** | | Sjálvklistrandi hefti við 2x3 frímerkjum og 2 postkort | 2 plakatir |













| | |
|---|---|
| **Útgáva:** | **Postgjaldsmerki 2023: Bygdarløg í Suðuroy** |
| **Útgávudagur:** | 20.02.2023 |
| **Virði:** | 4 x 21,00 DKK |
| **Stødd:** | 55,0 x 22,5 mm |
| **Listafólk:** | Janus Dam Guttesen |
| **Prentháttur:** | Flexo-prent |
| **Prentsmiðja:** | Limo Labels, Danmark |

Frímerkini eru bert royndarprent og ikki altíð enda-lig.

***Nýggjar vørur kunnu vanliga bíleggjast á heimasíðuni 2 vikur áðrenn útgávudagin***

**Layout:** Posta Stamps
**Perma:** Bygd
**Listafólk:** Arnold Vegghamar
**Prent:** TrykTeam, Danmark
ISSN 1603-0036

Posta Stamps
Óðinshædd 2
100 Tórshavn

**Tlf.** 346200
stamps@posta.fo
**www.stamps.fo**

@FaroeIslandsStamps
@faroeislandsstamps
@FaroeseStamps